# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Niels Paula Lave**, úr Froðba, vanliga nenvdur Palli, fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi Flaggdagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju mikudagin kl. 13.

**Olina Skorá**, Kaldbak, andaðist leygardagin 22. apríl, 90 ára gomul.
Kistan fer úr kapellinum í kvøld klokkan 18 til Nazareth, Kaldbak.
Jarðarferðin verður týsdagin 25.apríl kl. 14. Tey ið ynskja at minnast Olinu kunnu lata eina gávu til Nazareth, konto í Føroya Sparikassa.

**Svenn Brimheim**, Tórshavn, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygdardagin 22. apríl, 65 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Bjarnfríða Simonsen**, ættað av Sandi, búsitandi á Tingeyri í Íslandi andaðist leygardagin 22. apríl, 81 ár.
Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Sonja Tungá**, Skopun, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 22. apríl, 82 ára gomul.
Kistan fer úr kapellinum í dag kl. 14 á Gomlu Rætt.
Jarðarferðin verður úr Skopunar Kirkju týsdagin kl. 12. Sungið verður úr sálmabókini.
Tey, ið vilja minnast Sonju, kunnu lata Skopunar Kirkju ein pengingagávu, konta í pengingastovnunum.

## Dagurin í morgin

**25. apríl. Flaggdagur Føroya**. Tað var tann 25. apríl í 1940 at studentaflaggið Merkið var viðurkent sum Føroya tjóðareyðkenni.
Tað gamla navnið á degnum er *markusarmessa*, til minnis um evangelistin Markus. Týdningurin av navninum er óvissur.



Øllum tykkum sum á ymiskan hátt mintust meg á 80-ára føðingardegnum tann 13. apríl 2006 takki eg hjartaliga.

## Jarðarferð

Kistan við

**Niels Paula (Palli) Lave**
**úr Froðba**

fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsið
Flaggdagin kl. 17.00.

Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju
onsdagin kl. 13.00.

†

Okkara góði maður, pápi og abbi

**Svenn Brimheim**
Tórshavn

andaðist 22. apríl, 65 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum
týskvøldið kl. 18.00.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju
mikudagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Guðbjørg, Eilif og Annika**

*Tey, ið vilja minnast Svenn, kunnu lata eina gávu til Føroya Felag ímóti Krabbameini, á konto í peningastovnunum.*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu
og hjálpsemi, tá okkara elskaða kona, mamma,
vermóður og omma

**Randi Kristensen**
Tvøroyri

andaðist og varð jarðað.

Takk til tykkum øll, ið fylgdu henni til hennara
seinasta hvíldarstað.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávu til
Føroya felag móti Krabbamein.
Ein serstøk tøkk ktil Onkologisku deild
á Landssjúrkahúsinum, Suðuroyar Sjúkrahús,
Jónsvein Bech prest, sangarar og til øll tykkum,
sum á ymiskan hátt hjálptu til í sambandi við
jarðarferðina og ikki minst tit øll,
sum ringdu og komu inn á gólvið,
tað hjálpti í okkara sváru tíð.

*Familjunnar vegna*
**Charles, Magnus, Kristin og Estrid**

†



Kæri faðir, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Sigurður Breiðfjørð Halldórsson**

andaðist á sjúkrahúsinum í Keflavík í Ísland,i
páskadag tann 16. apríl 2006, 92 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Njarðvíkur kirkju
leygardagin tann 29. apríl 2006.

*Vegna tey avvarðandi*
**Sigurður, Elsa og Bergdis**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum
at okkara kæra systir

**Bjarnfríða Simonsen**
ættað av Sandi
búsitandi á Tingeyri í Íslandi

andaðist leygardagin 22. apríl, 81 ára gomul.

*Familjunnar vegna*
**Herbjørn og Niels**

†

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu,
tá kæra mamma, omma og langomma okkara

**Malena Fr. Thomsen**
Hvalba

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkum á sambýlinum fyri góða umsorgan.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til sambýlið.
Tøkk til Zacharias fyri góð og troystarrík orð
og til øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til
í sambandi við jarðarferðina.

*Familjunnar vegna*
**Poula og Jógvan**